| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**13. september 2012** | Blað nr.:<br>**9986** |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **13. september 2012** **kl. 17.30**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 213/12-236/12**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Jákup Símun Simonsen
Halla Samuelsen
Elin Lindenskov
Levi Mørk
Vagnur Johannesen
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU IKKI:**
Maria H. Olsen ið hevði forfall
Annfinn Brekkstein ið hevði forfall

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Bjørgfríð Ludvig

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**217/12** **2012-0178**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 13. september 2012:** Tikið til eftirtektar.

**218/12** **2012-0664/8 SG**

**Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2012**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2012 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 29. mars 2012:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2012 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 26. apríl 2012:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 2. mai 2012:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri mars 2012 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 31. mai 2012:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri apríl 2012 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 28. juni 2012:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri juni og juli 2012 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 13. september 2012:** Framlagt og góðkent.

**219/12** **2012-1900 KF**

**Broyting av byggisamtykt við Sundsvegin/Sortudýki og skipan av økinum við Kringvarpið, Norðurlandahúsið og nýggja Musikkskúlan**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at fleiri mál í seinasta hava verið undir viðgerð við niðasta part av Sundsvegnum og við Sortudýki, metir umsitingin at tað er rættast at samla alt hetta í eitt mál, soleiðis at býarskipanarliga viðgerðin verður fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, og soleiðis at eitt betri yvirlit fæst yvir alt økið, og framtíðar nýtsluna av økinum. Talan er um málini, umsóknir frá Oddmar Færø (2012-0231), Annu Mohr (2011-1565) og P/F Búrøkt (2011-1404) um broytingar av byggisamtykt, broytingar av Sundsvegnum (2008-1294 og 2012-0370) og ætlanir um útbygging av Kringvarshúsunum (2004-2487) og bygging av nýggjum musikkskúla (2009-3106).

**Stutt lýsing av umsóknum og ætlanum í økinum:**
Oddmar Færø (2012-0231) ynskir at fáa broytt byggisamtyktina fyri ognina matr. nr. 1457a, Tórshavn, sum liggur vestan fyri Sundsvegin frá D1 øki til A3-øki.

Anna Mohr (2011-1565) ynskir at fáa broytt byggisamtyktina fyri ognina matr. nr. 1454a, Tórshavn, sum liggur vestan fyri Sundsvegin frá D1 øki til A-økið, t.d. A3-øki.

P/F Búrøkt (2011-1404) ynskir at fáa broytt byggisamtyktina fyri part av ognini, matr. nr. 1401a, sum liggur eystan fyri Sundsvegin, frá D1 til blandaða íbúðabygging. Umsóknin nevnir ikki ítøkiliga hvat broytingin skal verða, men umsitingin metir hetta svara til A3-øki.

Við Sortudýki hevur Kringvarpið (2004-2487) nú í fleiri ár havt ymiskar ætlanir um útbyggingar av teirra bygningi á matr. nr. 1452c. Nú fyriliggur ein meira ítøkilig ætlan um útbygging. Umsitingin hevur havt fund við KvF hin 22. aug. 2012, har teir kunnaðu um útbyggingarætlan teirra.

Býráðið hevur samtykt at fara undir bygging av nýggjum musikkskúla (2009-3106) í økinum eisini, á matr. nr. 1409 og 1453a.

Í sambandi við yvirskipaði ferðsluviðurskifti í sambandi við nýggjan innkomuveg til Havnar, kemur Sundsvegurin at verða ein týðandi partur av ferðslusambandinum millum Norðara Ringveg og nýggja innkomuvegin. Býráðið avgjørdi tí 14. des. 2011 at lata gera uppskot til dagføring av Sundsvegnum (2008-1294 og 2012-0370).

At enda hevur býráðið eisini í sambandi við fíggjarætlanarviðgerðina fyri 2011 (2010-2717), avsett pening til at fáa gjørt eina ætlan fyri frílendi til borgaran á økinum við Hoydalsá. Umsitingin hevur síðani arbeitt við at gera eina skipanarætlan fyri lendið í økinum, soleiðis at tey verða borgarunum í býnum til bestu náttúru- og frítíðarupplivingar, við íðkanarmøguleikum og rørslufremjandi tilboðum (2012-0881). Eisini gjørdi kommunan í 2009 eina avtalu við Innlendismálaráðið um partar av økinum, við tí fyri eyga at skapa Føroya størsta, samanhangandi fríøki líka frá Boðanesgjógv niðan í Villingadal.

**Býarskipanarlig viðurskifti:**
Upprunin til fríøkið fram við Hoydalsá er frá 1930´unum, tá farið varð undir eina skipan við urtagarðsstykkjum. Í 1972 samtykti býráðið at leggja eitt stórt samanhangandi øki, líka frá Boðanesi niðan í Villingadal, út sum Frílendi D1-øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn, at nýta til almenning, náttúrufriðing og mentunarlig endamál. Í 1983 staðfesti Yvirfriðingarnevndin friðingarlinjur í økinum, og í 1995 var serstøk samtykt lýst á økið, um fríøkir, traðarbrúk og gróðursetingar.

Økið kring Kringvarpshúsið og Norðulandahúsið er í almennu byggisamtyktini lagt út sum C2-øki, ætlað til miðstaðarendamál, serstakliga stovnar, framsýningahallir, tónleikahallir og aðrar mentunarligar stovnar Ein partur av ognini hjá Kringvarpinum, er skógarfriðaður, og er gjørd ein serlig, skrivlig avtala um hetta økið millum Skógfriðingarnevndina og Kringvarpið.

Fyri ognirnar hjá kommununi, sum liggja eystan fyri Norðurlandahúsið, var gjørd ein serlig avtala millum kommununa og Norðurlandahúsið – eitt sokallað friðingarbræv. Norðurlandahúsið og kommunan hava viðgjørt hesa avtalu í

sambandi við ætlanina at byggja Musikkskúla har, og hevur Norðurlandahúsið tikið undir við ætlanini.

Hinar ognirnar vestan fyri Sundsvegin, sum hetta málið fevnir um – t.e. matr. nr. 1453b, 1454a og 1457a, eru lagdar út sum frílendi D1-øki í almennu byggisamtyktini. Sama ger seg galdandi fyri matr. nr. 1401a, sum liggur eystan fyri Sundsvegin, og er beinleiðis partur av stóra frílendinum fram við Hoydalsá.

**Ferðsluviðurskifti viðurskifti v.m.:**
Ongin ivi er um, at framtíðar leikluturin hjá Sundsvegnum, sum mest týðandi parturin av ferðslusambandinum millum Norðara Ringveg og nýggja innkomuvegin, kemur at føra til munandi vøkstur í ferðsluni eftir Sundsvegnum. Framskrivingar eru gjørdar í sambandi við viðgerðina av málinum um nýggjan innkomuveg (2001-0407), sum stuðla uppundir hetta.

Tað er heldur ongin ivi um, at útbyggingarætlanin hjá Kringvarpinum, har ætlanin er at savna útvarp og sjónvarp í Sortudýki, fer at føra til munandi meira ferðslu til bygningin og tørv á parkeringsplássum, ikki bert fyri starvsfólk, men eisini í sambandi við sendingar við áskoðara-/áhoyraraluttøku. Sama ger seg galdandi fyri Musikkskúlan, har fleiri hundrað næmingar koma og fara frá undirvísing dagliga. Samstundis er tað ein trupulleiki, at Norðurlandahúsið langt frá hevur nøktandi parkeringsumstøður til sítt vanliga virksemi, og heldur ikki hevur møguleika at útbyggja meira til eitt nú parkeringspláss. Neyðugt er tí, at ein framtíðar ætlan fyri hetta økið, letur upp fyri at loysa hesar trupulleikar, tá virksemið í økinum verður so nógv økt.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**
Ein týðandi munur millum D1-økið vestan fyri Sundsvegin (t.e. matr. nr. 1453b, 1454a, 1457a og part av 1458c) og D1-økið eystan fyri Sundsvegin (t.e. matr. nr. 1401a, 1401b, 1470bs og 1470m) er, at matriklarnir vestan fyri Sundsvegin liggja atskildir frá stóra D1-økinum fram við Hoydalsá, og liggja tí sum eitt sjálvstøðugt og náttúrliga avmarkað D1-øki uppat C2-økinum við Norðurlandahúsið, Kringvarpshúsið og komandi musikskúlan, meðan matr. nr. 1401a, eystan fyri Sundsvegin, er beinleiðis og samanhangandi partur av stóra frílendinum fram við Hoydalsá.

Ognirnar vestan fyri Sundsvegin, matr. nr. 1457a hjá Oddmar Færø (2012-0231) og matr. nr. 1454a hjá Annu Mohr (2011-1565) eru í dag ábygdar í ein ávísan mun og liggja í einum náttúrliga avmarkaðum øki, sum av Sundsvegnum er avskorið frá restini av samanhangandi D1 øki fram við Hoydalsá.

Her metir umsitingin, at grundarlag er fyri at broyta almennu byggisamtyktina soleiðis, at økið kring verandi sethús á matr. nr. 1457a hjá Oddmar Færø (2012-0231), matr. nr. 1454a hjá Annu Mohr (2011-1565) og matr. nr. 1453b hjá Jákup Garðshorn Mikkelsen kann broytast til A1-øki. Somuleiðis verður mett, at tann lítli parturin av matr. nr. 1458c hjá Ingu og Sámal Jákup Joensen, sum er D1-øki,

kann broytast til A3, eins og restin av hesum matriklinum. Tó soleiðis, at fyri allar hesar matriklar er galdandi, at økið verður tillagað móti Sundsvegnum, samsvarandi uppskoti til dagføring av Sundsvegnum, sum tekniska nevnd, byggi- og býarskipanarnevndin, fíggjarnevndin og býráðið skulu taka støðu til í næstum.

Restina av ognini matr. nr. 1454a hjá Annu Mohr (2011-1565), verður mælt til at broyta til C2-øki, sum gevur møguleika fyri framhaldandi bygging til ymisk mentunarlig endamál í økinum, og fyri at fáa eina varandi og framtíðartryggjaða loysn á atkomu- og parkeringsviðurskiftunum til verandi og komandi mentunarstovnar í økinum.

Samstundis verður mælt til, í serstakari byggisamtykt, at gera neyvari ásetingar um m.a. skipaða inn- og útkoyring móti Sundsvegnum og Norðara Ringvegi frá bæði verandi sethúsum og mentunarbygningum í økinum, soleiðis at ferðslan til og frá hesum økinum ikki kemur at darva framtíðar høvuðsferðslu á Sundsvegnum og Norðara Ringvegi.

Í sambandi við útbyggingarætlanirnar av Kringvarpshúsinum, keypti KVF í 2006 góðar 3000 $m^2$ av skógfriðaðum lendi av matr. 1457a, at leggja saman við 1452c. Í hesum sambandi gjørdi KVF avtalu við Skógfriðingarnevndina um bygging her við ávísum treytum. Fyriliggjandi útbyggingarætlan hjá KVF tekur hædd fyri nevndu avtalu, og er ætlan teirra ikki at byggja inni á skógfriðaða økinum. Umsitingin mælir tí frá at broyta ásetingarnar fyri tann partin av matr. nr. 1452c, sum er skógfriðað øki, og at hesin parturin av matr. nr. 1452c tí framhaldandi verður frílendi D1-øki.

Ognin hjá P/F Búrøkt (2011-1404) matr. nr. 1401a, liggur uppat samanhangandi D1 økinum fram við Hoydalsá, og ein stórur partur liggur harumframt innan fyri tí av friðingarmyndugleikunum ásettu friðingarlinjuna og innanfyri serstøku byggisamtyktina fyri Hoydalsá. Eigarin hevur søkt um loyvi at fremja tætta bústaðarbygging her.

Umsitingin metir, at hetta økið ikki kann metast sum eitt serstakt og náttúrliga avmarkað økið á sama hátt sum økið vestan fyri Sundsvegin, men at tað tvørturímóti er ein samanhangandi partur av stóra D1-økinum líka frá Boðanesgjógv niðan í Villingadal. Hetta stóra náttúruøki er náttúrliga avmarkað av Norðara Ringvegi móti suðuri, av Sundsvegnum og verandi byggingum móti vestri, av Skræddaragøtu og verandi byggingum móti norðuri, og av Flatavegnum móti vestri og verandi byggingum móti vestri, á ovasta partinum av økinum.

Umsitingin metir, at tað er í andsøgn við ætlanina um eitt slíkt stórt, samanhangandi náttúruøki, sum býráðið í 1972 tók avgerð um, og sum býráðið í 1995 gjørdi serstaka byggisamtykt fyri, um núverandi býráð fer at taka burturav hesum stóra og náttúrliga avmarkaða fríøkinum, at gera um til byggiøki. Hetta vil somuleiðis verða í andsøgn við tí avtalu, sum kommunan gjørdi við Innlendismálaráðið í 2009, um at tær ognir, sum landið eigur í hesum økinum,

verða partur av Føroya størstu frílendisætlan. Býráðið hevur eisini í 2012 bæði keypt onkra privata ogn í náttúruøkinum fram við Hoydalsá, og gjørt eina makaskiftisavtalu við landið í sambandi við økið til Skúladepilin í Marknagili, har kommunan fær fleiri landsognir í hesum stóra fríøkinum fram við Hoydalsá, júst við tí fyri eyga, at skapa karmarnar fyri at fáa eitt stórt samanhangandi náttúruøki.

Eisini metir umsitingin, at um tað fyrst verður givið loyvi til at broyta einstakar matriklar inni í hesum náttúrliga avmarkaða økinum til byggiøki, hevur býráðið ikki grundarlag fyri at nokta øðrum slíkum umsóknum í framtíðini, og er tí stórur vandi fyri, at ætlanin frá 1972 við hesum stóra og serliga náttúruøkinum fer fyri skeyti.

Umsitingin mælir tí frá at ganga umsóknini frá eigaranum av matr. nr. 1401a á møti, um at broyta økið til A3-øki, men at økið framhaldandi verður verandi partur av náttúrliga avmarkaða D1-økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til:
1. at byggisamtyktin fyri ognirnar vestan fyri Sundsvegin, matr. nr. 1453b og 1457a verður broytt til A1-øki og fyri matr. nr. 1454a verður broytt partvís til A1 og partvís til C2-øki, sí kort.
2. at parturin av matr. nr. 1458c vestan fyri Sundsvegin, sum er D1-økið, verður broytt til A3-øki, eins og restin av matriklinum, og verður fevnt av verandi serstøku byggisamtykt fyri 1458a, 1458b og 1458c.
3. at byggisamtyktin fyri skógfriðaða partin av matr. nr. 1452c ikki verður broytt.
4. at byggisamtyktin ognirnar eystan fyri Sundsvegin, matr. nr. 1401a og 1401b, ikki verður broytt.
5. at gjørd verður ein serstøk byggisamtykt fyri økið vestan fyri Sundsvegin (t.e. matr. nr. 1409, 1410d, 1452c, 1453a, 1453b, 1453c, 1454a, 1454d og 1457a), tá útbyggingarætlanin hjá Kringvarpinum og musikkskúlin hjá kommununi, eins og linjuføring fyri dagføring av Sundsvegnum, eru komin í eina fasta legu, við atliti til m.a. framtíðartrygging av atkomuviðurskiftum og økisparkering v.m. sambært omanfyri standandi viðmerkingum frá umsitingini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. september 2012:** Ein meiriluti: Levi Mørk, Jan Christiansen, Elin Lindenskov og Bogi Andreasen samtyktu at taka undir við 1, 2, 3 og 5 og beina málið í býráðið.

Eisini samtykti meirilutin at biðja um at umsitingin ger yvirlitskort yvir ognarviðurskiftini og friðingarlinjur í økinum at leggja fyri nevndina aftur á næsta fundi.

Ein minniluti: Jákup Símun Simonsen tekur undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 4. september 2012:** Kunnað varð um málið.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt at taka undir við punkt 1, 2, 3 og 5.

**220/12** **<u>2012-0231 KF</u>**

**<u>Umsókn frá Christin Andreasen, adv, vegna Oddmar og Ann Mari Færø um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 1457a, Tórshavn, frá D1 til A3-øki.</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Ognin matr. nr. 1457a, Tórshavn, liggur við Sundsvegin og sambært almennu byggisamtyktini í D1 øki.

Ognin er eisini skógarfriðað.

Umsøkjarin ynskir at byggisamtyktin verður broytt til A3-øki soleiðis at húsini kunnu útbyggjast.

Oddmar og Ann Mari Færø keyptu ognina matr. nr. 1457a, Tórshavn við ástandandi sethúsum óvitandi um at húsini ikki kundu útbyggjast av tí at tey liggja í D1-øki.
Rættarmál hevur verið koyrt ímóti seljarunum, sum nú er avgreitt við endaligari semju millum partarnar.

Víst verður á, at økið ikki er partur av nakrari heildarætlan viðvíkjandi fríøki og heldur ikki hevur samband við friðingina av Hoydalsá.

Umsøkjarin sigur, at økið norðan eystanfyri ognina er víðkað til at verða eitt A3-øki.

Hetta er ikki heilt rætt. Eingin ogn í grannalagnum er broytt til byggiøki.. Økið norðan eystanfyri ognina hevur síðani tað kom við í byggisamtyktina í 1982 ligið sum A1-byggiøki. Í sambandi við skipan av íbúðum á Blómubrekku bleiv byggisamtyktin broytt, soleiðis at økið Berjarbrekka, Blómubrekka og oman til og við 1458a, vóru broytt frá A1 til A3 øki. Henda broyting var góðkend av Oljumálaráðnum 8. apríl 2003. (J.nr. 2003-0363). 14. juli 2011var ein serstøk byggisamtykt um skipan av matr. nr. 1458a, Tórshavn, góðkend.

Hetta D1-øki hevur samband við D1-øki við Hoydalsá og gongur tvørtur um Sundsvegin yvir ímóti Útvarpshúsinum og Norðurlandahúsinum í einum uml. 150 m geira. Byggiøkið er báðu megin hendan geiran - A3-bústaðarøki norðanfyri og

C2-øki sunnanfyri, har ætlanir eru um bygging. Økið í geiranum er privatar ognir við ástandandi húsum.

Vísandi til at, D1 øki gongur tvørtur um Sundsvegin, liggur ímillum byggiøkir og at bygging longu er inni á økinum, metir umsitingin ikki at nakað er til hindurs fyri at broyta byggisamtyktina fyri økið. Tó skal hædd takast fyri at partur av D1-økinum er skógfriðað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti vísandi til omanfyristandandi. Tó skal hædd takast fyri at partur av D1-økinum er skógfriðað.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. juni 2012:** Nevndin samtykt at útseta málið til komandi fund.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Nevndin samtykti, at uppskot til broytingar av byggisamtyktini fyri D1 økið fram við Sundsvegnum niðan til Birnugøtu, verður at leggja fyri nevndina í august 2012.

Elin Lindenskov og Jákup Símun Simonsen vilja tryggja, at atlit verður tikið til breiðkan av Sundsvegnum, fjarhitaleiðingum og øðrum.

Levi Mørk og Jan Christiansen átala harliga, at umsitingin ikki hevur gjørt uppskot til broytan av byggisamtyktini, soleiðis sum samtykt varð í byggi- og býarskipanarnevndini 11. apríl 2012.

**Ískoyti:**
Býarskipanarliga viðgerðin av umsóknini er viðgjørd sum partur av eini heildarviðgerð av økinum í mál nr. 2012-1900, og verður víst til málslýsing og tilmælið í nevnda málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. september 2012:** Víst verður til mál j.nr, 2012-1900 og beina málið í býráðið.

**Býráðið 13. september 2012:** Tikið til eftirtektar.

**221/12** **<u>2011-1565 KF</u>**

**Umsókn frá Annu Mohr um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 1454a, Tórshavn, frá D1 til A3-øki.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**

Ognin matr. nr. 1454a, Tórshavn, liggur við Sundsvegin og sambært almennu byggisamtyktini í D1 øki.

Umsøkjarin ynskir at byggisamtyktin verður broytt til A-byggiøki t.d. A3-øki.

Umsøkjarin sigur, at fleiri av ognunum í grannalagnum eru umflokkaðar og lagdar út sum byggiøkir.

Hetta er ikki heilt rætt. Eingin ogn í grannalagnum er broytt til byggiøki. Økið norðan eystanfyri ognina hevur síðani tað kom við í byggisamtyktina í 1982 ligið sum A1-byggiøki. Í sambandi við skipan av íbúðum á Blómubrekku bleiv byggisamtyktin broytt, soleiðis at økið Berjarbrekka, Blómubrekka og oman til og við 1458a, vóru broytt frá A1 til A3 øki. Henda broyting var góðkend av Oljumálaráðnum 8. apríl 2003. (J.nr. 2003-0363). 14. juli 2011var ein serstøk byggisamtykt um skipan av matr. nr. 1458a, Tórshavn, góðkend.

Hetta D1-øki hevur samband við D1-øki við Hoydalsá og gongur tvørtur um Sundsvegin yvir ímóti Útvarpshúsinum og Norðurlandahúsinum í einum uml. 150 m geira. Byggiøkið er báðu megin hendan geiran - A3-bústaðarøki norðanfyri og C2-øki sunnanfyri, har ætlanir eru um bygging. Økið í geiranum er privatar ognir við ástandandi húsum.

Vísandi til at, D1 øki gongur tvørtur um Sundsvegin, liggur ímillum byggiøkir og at bygging longu er inni á økinum, metir umsitingin ikki at nakað er til hindurs fyri at broyta byggisamtyktina fyri økið. Tó skal hædd takast fyri at partur av D1-økinum er skógfriðað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsókníni á møti vísandi til omanfyristandandi. Tó skal hædd takast fyri at partur av D1-økinum er skógfriðað.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. juni 2012:** Nevndin samtykt at útseta málið til komandi fund.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Nevndin samtykti, at uppskot til broytingar av byggisamtyktini fyri D1 økið fram við Sundsvegnum niðan til Birnugøtu, verður at leggja fyri nevndina í august 2012.

Elin Lindenskov og Jákup Símun Simonsen vilja tryggja, at atlit verður tikið til breiðkan av Sundsvegnum, fjarhitaleiðingum og øðrum.

Levi Mørk og Jan Christiansen átala harliga, at umsitingin ikki hevur gjørt uppskot til broytan av byggisamtyktini, soleiðis sum samtykt varð í byggi- og býarskipanarnevndini 11. apríl 2012.

**Ískoyti:**
Býarskipanarliga viðgerðin av umsóknini er viðgjørd sum partur av eini heildarviðgerð av økinum í mál nr. 2012-1900, og verður víst til málslýsing og tilmælið í nevnda málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. september 2012:** Víst verður til mál j.nr, 2012-1900 og beina málið í býráðið.

**Býráðið 13. september 2012:** Tikið til eftirtektar.

**222/12** **<u>2012-1672</u>**

**<u>Viðvíkjandi viðtøkur fyri Eigarafelagið undir Kongavarða</u>**

**Lýsing av málinum:**
Advokatskrivstovan biður um góðkenning av viðtøkum fyri Eigarafelagið undir Kongavarða.

*Grein 8 ásetur:*
Felagið verður stýrt av eini 5-mannanevnd, sum verður vald á aðalfundi. Fyrsta nevndin verður vald á stovnandi aðalfundinum.

So leingi Sp/f Valbjørn Dalsgarð ikki hevur avhendað samlaða útstykkingina í síni heild, kann Sp/f Valbjørn Dalsgarð velja ein av nevndarlimunum.
Nevndin fær fulltrú til at fremja endamál eigarafelagsins og umboðar felagið úteftir.

Mælt verður til hesar broyting:

*Í grein 8 verður sett inn*:
Felagið verður stýrt av eini 5-mannanevnd, sum verður vald á aðalfundi. Fyrsta nevndin verður vald á stovnandi aðalfundinum.

*Ein valdur nevndarlimur situr 2 ár. 3 nevndarlimir verða valdir á ári sum er eitt líka ár og 2 nevndarlimir verða valdir á ári sum er eitt ólíka ár. Tiltakslimir sita 2 ár, og stendur ein fyri valið hvørt ár.*

So leingi Sp/f Valbjørn Dalsgarð ikki hevur avhendað samlaða útstykkingina í síni heild, kann Sp/f Valbjørn Dalsgarð velja ein av nevndarlimunum.
Nevndin fær fulltrú til at fremja endamál eigarafelagsins og umboðar felagið úteftir.

**Tilmæli:**
Leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla fíggjarnevndini og byráðnum til at góðkenna viðtøkurnar fyri Eigarafelagið undir Kongavarða við omanfyri nevndu broyting.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt.

223/12 **2004-0441**

**Matr. nr. 135ap, Hoyvík**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Stødd 500 m².
Stykkið er útgrivið og planerað.
Skeytið er tinglýst 1997.
Jóansgøta 18.

Vísandi til at kommunan rykkir um byggifreistir, hevur eigarin av stykkinum avgjørt at lata stykkið innaftur til kommununa.

| | |
|---|---|
| Kostprísur | kr. 274.176,00 ( pr. m² kr. 548,35) |
| Útgrevstur planering | kr. 83.162,50 ( pr. m² kr. 166,33) |
| Prísur í alt | kr. 357.338,50 ( pr. m² kr. 714,68) |

**Tilmæli:**
Leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla til at keypa grundøkið fyri kr. 357.338,50 + útreiðslur til tinglýsing kr. 2.786,69.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt.

**224/12** **2011-2159**

**Viðtaluhølir til 10. og 11. kommunulæknan í Suðurstreymoyar Læknadømi (Víst verður eisini til j. nr. 2010-1937)**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Almanna- og heilsumálaráðið játtaði fyri tið síðani at normera 10. og 11. kommunulæknastarvið í Suðurstreymoyar Læknadømi, men bíða hevur verið við at lýsa størvini leys, til kommunan hevði viðtaluhøli til taks.

Umsitingin hevur arbeitt við ymiskum møguleikum og hevur eisini verið í samráðingum við P/f. Miðlon um at leiga høli til 3 læknar á aðru hædd í Miðlon.

Ráðgevi hevur fyri útleigaran latið gera innrættingaruppskot, har serligur dentur er lagdur á møguleikar til samstarv, fakligt umhvørvi og felagsfunktiónir. Uppskotið hevur støði í høliskrøvunum sambært kunngerð nr. 64 frá 29. september 2004 um støðið, viðlíkhald, rakstur v.m. av viðtaluhølum hjá kommunulæknum; álitinum um nýggja kommunulæknaskipan handað landsstýrismanninum í heilsumálum í desember 2010, har serligur dentur er lagdur á, at kommunulæknaviðtalur skulu skipast í størri eindir; og ráðgeving frá lækna um arbeiðsgongdir v.m.

Leigukostnaðurin er kr. 980 um árið. Umbyggingarkostnaðurin er mettur til kr. 3.665.500, og verður afturgoldin yvir eitt ávíst áramál.

Talan er um stórt leigumál. Mett verður tí skilabest at gera ein 10 ára leigusáttmála við møguleika at leingja hann. Mett verður eisini skilabest, at umbyggingarkostnaðurin verður afturgoldin yvir 10 ár.

Støða verður seinni tikin til, hvørjir læknar skulu fáa í boðið at flyta inn í Miðlon. Ætlanin er at kommunulæknin, sum hevur viðtaluhølir í J. Paturssonargøtu, eisini flytir í Miðlon.

Samlaður árligur kostnaður verður við hesum:

| | | |
|---|---|---|
| Leigukostnaður | kr. | 637.980 |
| Umbyggingarkostnaður v/mvg | kr. | 366.550 |
| | kr. | 1.004.530 |

Leigukostnaðurin verður prístalsviðgjørdur. Neyðugt er við hægri játtan til kommunulæknaskipanina í 2012.

Heilsumálaráðið hevur givið endaliga váttan fyri, at tveir kommunulæknar verða settir afturat í Suðurstreymoyar Læknadømi, tá hølir verða tøk til tess – tó í fyrsta lagi 1. desember 2011.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at gera 10 ára sáttmála við P/f. Miðlon um at leiga 651 fermetrar til 3 kommunulæknar.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

Sosiala nevnd 20.september 2011: Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 26. september 2011: Útsett til nærri kanningar.

**Býráðið 29. september 2011:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd og gera 10-ára leigusáttmála um at leiga 651 fermetrar til 3 kommunulæknar.

**Býráðið fyri læstum hurðum 20. oktober 2011:** Samtykt at samráðast um 10-ára leigusáttmála um høli til tríggjar kommunulæknar, tó við teirri treyt at prísurin verður lægri enn tann í fyriliggjandi uppskoti.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur samráðst bæði um leigukostnað og innrættingina. Leigumálið er til 3 kommunulæknar. Samlað er talan um 651 fermetrar, og fermetraprísurin er lækkaður til kr. 970. Árliga leigan verður 1. januar á hvørjum ári javnað samsvarandi prístalinum.

Mett verður, at parturin hjá kommununi at gjalda fyri at gera hølini klár er kr. 2,5 mió, tvs. ein fermetrakostnaður á kr. 3.840, sum mett verður er á hóskandi støði. Kommunan setir sum treyt, at útleigarin rindar møguligan kostnað, sum er omanfyri kr. 2,5 mió. Í hesum sambandi skulu lógar-, góðsku- og haldføriskrøv ásetast, og kommunan fáa byggiroknskap skjalprógvaðan.

Upprunaætlanin var at fíggja innrættingina yvir rakstur. Við at fíggja arbeiðið sum íløga, er samlaði kostnaðurin fyri 10 ára skeiðið munandi lægri. Á grein 2 er tó eingin íløgujáttan tøk til endamálið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at gera 10 ára leigusáttmála við hesum treytum, og at játtaðar verða kr. 2,5 mió sum íløga at fíggja innrættingina.

**Sosiala nevnd 15. november 2011:** Ein meirluti, Halla Samuelsen, Marin Katrina Frýdal og Levi Mørk, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina at fáa til vega játtan til íløguna.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Vagnur Johannesen, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 16. november 2011:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Elin Lindenskov, samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd og játta 2.500 tkr. av konto 2210 av íløguætlanini fyri 2012.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 24. november 2011:** Bogi Andreasen fór av fundi meðan mál nr. 257/11 varð viðgjørt.

Atkvøtt varð um tilmæli frá fíggjarnevndini 16. november 2011, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Rúni Djurhuus, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein

**Ískoyti**
Kommunan hevur sambært løgtingslóg um kommunulæknaskipan § 7 skyldu at útvega og rinda viðtaluhøli við neyðugum innbúgvi, tólum og amboðum til kommunulæknar. Í kunngerð um støði, viðlíkahald, rakstur v.m. av viðtaluhølum hjá kommunulæknum § 4 verður er neyvari ásett, hvørji tól, amboð og innbúgv viðtaluhøli skulu hava.

Í íløguætlanini fyri 2012 eru settar kr. 950.000 av til kommunulæknaskipan konta 2775, L22002.

<u>1. Innbúgv</u>
Kontrast arkitektar hava staðið fyri útboði av innbúgvi. Úrslitið var hetta:

| | Tilboð | Alternativt tilboð |
|---|---|---|
| Inventartænastan | kr. 471.654,00 | kr. 361.526,00 |
| Blika | kr. 498.339,00 | kr. 528.539,00 |
| Idé Møblar | kr. | kr. |
| Nema | kr. 473.495,00 | kr. 414.975,00 |
| Byggitilfar | kr. 373.190,00 | kr. |
| Eikin | kr. | kr. |

Eftir gjøgnumgongd av innkomnu tilboðunum metir Kontrast arkitektar, at alternativa tilboðið hjá Nema er besta boðið bæði í mun til prís og dygd. Mælt verður til at taka av hesum tilboðnum. Sagt verður víðari, at næstbesta tilboðið prís í mun til dygd er tilboðið hjá Byggitilfar, meðan mælt verður frá lægsta

tilboðnum hjá Inventartænastuni, sum ikki er eit dygdargott tilboð heldur ikki í mun til snið.

Brúkarabólkurin, tað er kommunulæknarnir í Miðlon, mæla til at taka av alternativa tilboðnum hjá Nema kr. 414.975.000.

<u>2. Læknaútgerð</u>
Umsitingin hevur heintað tvey tilboð inn uppá læknaútgerð.

| | |
|---|---|
| Seelen Care | kr. 271.521,37 |
| Blika | kr. 341.343,05 |

Brúkarabólkurin mælir til at taka av tilboðnum hjá Seelen Care.

<u>3. KT-útgerð</u>
KT-deildin hevur heintað tilboð uppá telduútgerð.

| | |
|---|---|
| Formula | kr. 111.495,00 |
| Nema | kr. 124.145,00 |
| Elektron | kr. |

KT-deildin mælir til at taka av tilboðnum frá Formula kr. 111.495.

Harumframt hevur KT-deildin heintað inn tilboð frá Føroya Tele um telefonútgerð. Tilboðið er kr. 47.495,00.

<u>Samlað tilboð við støði í tilmælunum omanfyri:</u>

| | |
|---|---|
| Innbúgv Nema | kr. 414.975,00 |
| Læknaútgerð Seelen Care | kr. 271.521,37 |
| Telduútgerð Formula | kr. 111.495,00 |
| Telefonútgerð Føroya Tele | kr. 47.495,00 |
| Í alt u/mvg | kr. 845.486,37 |

Við mvg 6,25% verður kostnaðurin kr. 898.329,27.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á sosialu deild mæla til at taka av omanfyri nevndu tilboðum frá Nema kr. 414.975,00, frá Seelen Care kr. 271.521,37, frá Formula kr. 111.495,00, og frá Føroya Tele kr. 47.495,00.

**Sosiala nevnd 21.august 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Ráðgevin Mayfinn Norðoy greiddi frá útbjóðingini av innbúnum.

Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Elin Lindenskov, mælir til at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Bogi Andreasen, mælir til at taka undir við tilmælinum tó soleiðis, at í mun til innbúgvið verður mælt til at taka av tí lægsta tilboðnum hjá Inventartænastuni.

Nevndin samtykti at mæla býráðnum til, at kommunan ger reglugerð um útbjóðing av innbúgvi og líknandi útgerð, sum ikki er fevnt av lisitatiónslógini.

**Býráðið 13. september 2012:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Vagnur Johannesen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jan Christiansen, Sjúrður Olsen og Bogi Andreasen.

225/12 **2012-1209**

**Meirnýtsla á deild 8114, Kavarudding í 2012**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Vegna nógvan kava og ov lítla játta heldur játtanin til kavarudding ikki í 2012. Kostnaðurin fyri kavarudding í 2011 var uml. 3 mió. kr. og netto játtanin fyri 2012 uml. 1,5 mió. kr. og primo apríl í ár var kontoin áleið brúkt.

Mett verður, at talan verður um eina meirinýtslu á uml. 1,5 mió. kr. fyri fíggjarárið 2012. Verður sama kavaveður næsta vetur og skal støðið á kavaruddingini ikki broytast, verður neyðugt at økja játtanina hjá deild 8114 við uml. 1,5 mió. kr.

Møguleikarnir fyri at fáa javnvág í roknskapin fyri kavaruddingina eru antin at fáa útvega eina eykajáttan ella at flyta pening av aðrari rakstrarkonto.

**Fíggjarstøðan pr. apríl 2012:**

| Deild | Bókað hendanmð | Bókað higartil | Ætlan higartil | Brúkt í pct (higartil) | Ætlan fyri árið | Brúkt í pct (árið) | Avlop |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8112 Asfalt | 503 | 1.798 | 3.513 | 51,18 | 10.549 | 17,04 | 8.751 |
| 8114 Kavarudding | 132 | 1.635 | 997 | 164,06 | 2.334 | 70,05 | 699 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildiini mæla til at játta eina eyðkajáttan á 1,5 mió. kr. til Kavarudding deild 8114. Mælt verður í øðrum lagi til at flyta 1,5 mió. kr. frá Asfaltdeildini 8112, til kavaruddingina, deild 8114.

**Tekniska nevnd 22. mai 2012:** Nevndin samtykti at heita á fíggjarnevndina um at fáa til vega eyðkajáttan á 1,5 mió. kr. til kavarudding deild 8114, fyri 2012.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Samtykt at beina málið aftur í teknisku nevnd at ávísa fígging.

**Ískoyti**
Avgerðin hjá fíggjarnevndini 23. mai 2012 um at beina áheitanin frá teknisku nevnd um eykajáttan aftur til nevndina merkir, at fíggjarnevndin ikki tekur undir við teknisku nevnd 22. Mai 2012, um at veita eykajáttan, og at peningurin tískil skal finnast innanfyri verandi fíggjarætlan.

Vísandi til at arbeitt hevur verið við asfaltætlanini burturav um summarhálvuna, er ikki longur rúm fyri at fíggja hallið á kavaruddingini av asfaltkonto'ini, soleiðis sum tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin annars mæltu til meðan rúm enn var fyri hesum á kontoini, hin 22. mai 2012.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til, at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina, at fíggja upphædd álj. kr. 1,5 mió. av kt. 8175 – íløga í vegir, avsett til Glyvursveg við brúgv (mál nr. 2006-3283), og at játtan til Glyvursvegin við brúgv verður tillagað samsvarandi, eftir at lisitatión hevur verið í okt. 2012, í langtíðar íløguætlanini fyri 2013 og 2014.

**Tekniska nevnd 4. september 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt.

**226/12** **2008-3134 EY**

**Høvuðsprojekt-Nevndarviðgerð: Rundkoyringin Sundsvegur – Blómubrekka - Óluvugøta**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Víst verður til mál j.nr. 2005-2344: Dispositiónsuppskot: Rundkoyring Sundsvegur – Blómubrekka – Óluvugøta.

Dispositiónsuppskotið hevur verið til "Ferðslutrygdargrannskoðan" hjá Viatrafik, sí j. nr. 2008-3124/1.
Somuleiðis hevur Viatrafik gjørt eitt projektuppskot við koyrikurvum, sí j. nr. 2008-3125/1. Projektuppskotið er broytt nakað í mun til dispositiónsuppskotið.

Umsitingin hevur gjørt ráðgevingaravtalu við LBF P/f um projektering og eftirlit viðvíkjandi rundkoyringini. Víst verður til j. nr. 2008-3127/1.

Ráðgevingarfyritøkan LBF P/f hevur gjørt høvuðsprojekt, sí j. Nr. 2008-3132/1, grundað á projektuppskotið frá Viatrafik.

Rundkoyringin hevur ein diametur upp á 37 m við 3 m gongu- og súkklubreyt.

Atlit eru tikin til estetik, og at møguleiki verður at planta vøkstur í skráarnar. Eisini verður grótgarður laðaður, har tað er neyðugt.

**Fíggjarviðurskiftir:**
LBF P/f hevur gjørt eina kostnaðarmeting av arbeiðnum, sí j. nr. 2008-3133/1.

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting íroknað projektering og eftirlit, umsiting, óvæntaðar útreiðslur, reinskan av vegvatni og 6,25% mvg, sí j. nr. 2008-3133/2.

**Tekniska nevnd skal taka støðu til fygljandi:**
1. Endaliga góðkenning av høvuðsprojektinum og kostnaðarmeting
2. Útbjóðingarháttur

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at arbeiða víðari við fyriliggjandi loysn - tó so, at hædd verður tikin fyri framskrivaðum ferðslutrýsti á økinum við støði í frágreiðing frá Rambøl Nyvig frá apíl 2008 um Innkomuvegin til Havnar (sí mál nr. 2001-0407) og annars at projektið tekur hædd fyri verkætlanini viðv. dagføringini av Sundsvegnum (sí mál nr. 2008-1294).

**Tekniska nevnd 12. juni 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Umsitingin hevur heitt á ráðgeva um at gera uppskot til eina tveysporaða rundkoyring. Víst verður til TK j. nr. 2008-3132/2. Tilkoyringarvegurin Sundsvegur er ætlaður til at verða tveysporaður í framtíðini, meðan tilkoyringarvegirnir Blómubrekka og Óluvugøta verða einsporaðir vegir í framtíðini.

**Keyp av lendi:**
Lendisviðurskiftini verða broytt nakað í mun til fyrra uppskotið, og má hesin spurningurin takast upp við eigararnar av matr. nr. 1464a, 1466.

**Fíggjarviðurskifti:**
Umsitingin hevur heitt á ráðgevan LBF P/f um at gera eina kostnaðarmeting av dupultrundkoyringini, sí skjal nr. 2008-3133/3.

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting íroknað projektering og eftirlit, umsiting, óvæntaðar útreiðslur, reinskan av vegvatni og 6,25% mvg, sí j. nr. 2008-3133/4.

**Tekniska nevnd skal taka støðu til fygljandi:**
1. Endaliga góðkenning av høvuðsprojektinum og kostnaðarmeting

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðkenna høvuðsprojektið og kostnaðarmetingina og at málið um útvegan av meira lendi verður beint í fíggjarnevndina til at taka upp samráðingar við lendiseigararnar.

**Tekniska nevnd 18. september 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at umsitingin leggur uppskotið við ítøkiligari kostnaðarmeting fyri nevndina aftur, áðrenn arbeiðið verður boðið út.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ætlanum at byggja tónlistarskúla á økinum eystan fyri Norðurlandahúsið og við vegaíbinding til Sundsvegin, skal støða takast til um ikki vegamótið Sundsvegur/Óluvugøta/Blómubrekka skal dagførast við ætlaðu rundkoyringini. Málið um gerð av rundkoyring hongur eisini saman við alsamt væntandi øktari ferðslu í sambandi við atkomuvegin til Havnar. Harumframt kann væntast økt ferðslutrýst í sambandi við íbúðarbygging á økinum millum Blómubrekku og Villingardalsvegin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at nevndin, umvegis fíggjarnevndina og býráðið, raðfestir avseting av 8,6 mió. kr. (smb skjal nr. 2008-3133/2) til at gera útbjóðingartilfar til rundkoyringina at leggja fyri nevndina aftur, og at fremja arbeiðið, á íløguætlanini fyri 2012.

**Tekniska nevnd 25. august 2011:** Málið umrøtt.

Sjúrður Olsen luttók ikki.

**Tekniska nevnd 22. september 2011:** Nevndin samtykti at umsitingin, ísv. við málið um dagføring av Sundsvegnum, j. nr. 2008-1294, kannar ymsar vegaloysnir á vegamótinum Sundsvegur-Óluvugøtu.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt við øðrum vegaloysnum á vegamótinum. Greitt verður frá hvørjari loysn kommunan kundi arbeitt eftir.
Settar eru 2 mió. kr. av til rundkoyring við Óluvugøtu fyri fíggjarárið 2012 (§6 konto 8175).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta kr. 200.000,- av íløgum fyri 2012 (§6, kto. 8175) til projektering av skitsuuppskoti við kostnaðarmeting, at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 1. desember 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at játta kr. 200.000 av íløgum fyri 2012 av konto 8175 til projektering av skitsuuppskot og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitignin hevur saman við ráðgeva latið gera skitsuuppskot við kostnaðarmeting. Greitt verður frá uppskotunum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við skitsu nr. 5, VFS 14.05.2012, sí j. nr. 2008-3134/x-x.

**Tekniska nevnd 22. mai 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskoti, skitsa 3A, VFS 10.05.2012, sí j. nr. 2012-0370/10 og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 300.000,00 av konto 8175, vegir.

**Býráðið 31. mai 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið, at gera rundkoyringina, er boðið út til tveir arbeiðstakarar.

Lisitatión verður áðrenn fundin í teknisku nevnd, og verða tilboðini við tilmæli, løgd fram á fundinum.

Vísandi til at lisitatión er beint eftir at skráin er farin út, kemur tilmæli til fundin.

Tilboðini frá teimum bjóðandi vóru hesi:
P/f J & K Petersens Contr. kr. 522.471,- (uttan mvg)
P/f Articon kr. 668.798,- (uttan mvg)

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting, íroknað byggiharraveitingar, eftirlit, mvg v.m. Víst verður til innanhýsis skjal nr. 2008-3134/16.

Býráðið hevur áður játtað kr. 200.000 og kr. 300.000 av íløgum fyri 2012, konto 8175-L81006.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at taka av lægra tilboðnum frá P/f J & K Petersens Contr.áljóðandi kr. 522.471,- (uttan mvg).

Mælt verður eisini til at játta kr. 300.000,- til írestandi fígging av verkætlanini sambært innanhýsis skjali nr. 2012-0370/16 av §6 konto 8175 – L81003, Glyvursvegur við brúgv og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 4. september 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt.

**227/12** **<u>2012-1353 (sí eisini má nr. 2007-2796) EY</u>**

**<u>Býingavegur millum Blómubrekku og Villingardalsvegin – 1. stig</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í framhaldi av máli nr. 2007-2796, fevnir hetta málið um sjálva vegagerðina av vegi millum útstykkingina hjá sp/f Bjarni Poulsen og Blómubrekku.

Talan er um vegagerð sambært skjali nr. 2007-2796/35, sum verður framlagt til støðutakan.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Fyri at fara undir vegagerðina er neyðugt at játta fígging, sum sambært fyribilsmetingum er mett til at verða uml. 2,1 mió. kr. smb. skjali j. nr. 2012-1353/4. Fíggjartørvur álj. 2,1 mió verða at útvega sum eykajáttan sambært skjali j. nr. 2012-1353/5.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at:

1. taka undir við skitsu uppskotinum skjali nr. 2007-2796/35.
2. beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina, at fíggja upphædd álj. kr. 2,1 mió. av kt. 8175 – íløga í vegir, avsett til Glyvursveg við brúgv (mál nr. 2006-3283).
3. heimila umsitingini at fara undir at bjóða arbeiðið út sum inboðin lisitatión at leggja fyri teknisku nevnd aftur.

**Tekniska nevnd 25. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ráðgevi hevur, vegna kommununa, boðið arbeiði, at gera vegin, út til fimm arbeiðstakarar.

Tilboðini vóru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| Andreas Berg Sp/f | 1.991.820 kr. (uttan MVG) |
| Articon P/F | 1.343.380 kr. (uttan MVG) |
| J & K Petersen P/F | 1.996.369 kr. (uttan MVG) |
| Plan Sp/f | 2.144.547 kr. (uttan MVG) |
| R.J. Brockie Sp/f | 1.529.685 kr. (uttan MVG) |

Ráðgevin hevur eftirkannað tilboðini, og mælir til at taka av lægsta tilboðnum. Umsitingin hevur gjørt samlaða kostnaðarmeting, íroknað projektering, eftirlit, ókent, prosjektumsiting, mvg v.m., og metir at samlaði kostnaðurin kann haldast innfyri játtaða fíggjarkarmin.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til, at nevndin heimilar umsitingini, at taka upp samráðingar og gera sáttmála við Articon P/F, ið hevði lægsta boð, um gerð av arbeiðinum, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 4. september 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt.

**228/12** **<u>2012-1889 HH</u>**

**<u>Uppskot til makaskifti á Sanatoriutrønni, millum matr.nr. 1335 og 1336, Tórshavn</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við arbeiðið við frílendisætlan fyri økið á Sanatoriutrønni og har um leiðir, sum Innlendismálaráðið og Tórshavnar kommuna samdust um í 2009, var settur ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri Landsstýrið og kommununa, at arbeiða við ætlanini.

Arbeiðið steðgaði upp, meðan Landsstýrið hevur arbeitt við uppsøgn av øllum traðar- og leigumálum av landsognum í økinum. Nú er hetta komið so mikið áleiðis, at arbeiðsbólkurin aftur fer til verka, og miðjar Landsstýrið eftir, at ætlanin verður liðug um árskiftið.

Ein partur av arbeiðsuppgávuni er at fáa greiði á formligu viðurskiftunum í økinum. Í hesum sambandi hevur Umhvørvisstovan, saman við kommununi, skrásett ein part av Eystara ringvegi sum ogn kommununar, í samsvari við eina gamla ognartøku frá byrjanini av 80'unum.

Eftir er tó at greiða viðurskiftini við tí partinum av eystara ringvegi, sum liggur millum Hoyvíksvegin og Hvítanesvegin.

Til tess at fáa loysn á hesum málinum, skýtur Umhvørvisstovan upp, at gera eitt makaskifti millum Tórshavnar kommunu og Føroya Landsstýri, sum lýst í notati frá Umhvørvisstovuni, j. nr. 2012-1889/1.

Umhvørvisstovan skýtur upp, at matr.nr 1336 hjá Tórshavnar kommunu letur í alt 4386 m² til matr.1335, sum Landsstýrið eigur. Afturfyri letur Landsstýrið 6032 m² frá matr.nr 1335 til matr. 1336. Matr. nr. 1336 hjá kommununi er tað sum fyrr er avlagt til eina vegaføring frá krossinum Eystari Ringvegur/Hoydalsvegur og oman í Hoydalar.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Orsakað av, at tað verður Umhvørvisstovan sum ynskir makaskifti, verður tað framt uttan kostnað fyri kommununa.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
Umhvørvisstovan hevur sent kommununi uppskot við frágreiðing um makaskifti, j. nr. 2012-1889/1.

**Tilmæli:**
Vísandi til, at hetta er í samsvari við ætlanina um stóra frílendi fyri alt økið frá Boðanesi niðan í Villingardal, og somuleiðis er partur av matrikulerari upprudding framvið Eystara Ringvegnum, mælir tekniski stjórin til at taka undir við uppskotinum hjá Umhvørvisstovuni, og at beina málið í býráðið, um teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. september 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 4. september 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt.

**229/12** **<u>2012-0111 (sí eisini mál nr 2001-0243) FNJ</u>**

**<u>Prosjektering av moldplássinum í Kollafirði</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í framhaldi av mál nr. 2001-0243 er avgerð er tikin um at skipa eitt moldøki í Kollafirði á leið har tað verandi moldøkið liggur. Talan er um økið vestanfyri Dalánna, t.e. millum Dalánna og uppdyrkingarvegin, ið Royndarstøðin hevur latið gera. Víst verður í hesum sambandi til uppskot til støðuplan j.nr. 2001-0243/25.

Ráðgevi hevur, saman við umsitingini, latið gera skitsu uppskot yvir økið, og er hetta lagt fram fyri Búnaðarstovuna tann 23.03.12, (sí j.nr. 2012-0111/7). Endaligt skipanaruppskot verður lagt fyri Búnaðarstovuna 15.06.12 at góðkenna. Uppskotið og samlað kostnaðarmeting, (sí j.nr. 2012-0111/8) verða framløgd á fundinum til støðutakan.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Samlaði kostnaðurin fyri útvegan av lendi og gerð av arbeiðinum verður mettur til kr. 15.665.181,00 íroknað mvg, evt. 16.228.306,00 íroknað mvg, um kloakkleiðing verður løgd í atkomuvegin. Verður haraftur ímóti talan um leigu av lendi verður mett, at arbeiðið kemur at kosta kr. 6.619.375,00 íroknað mvg, evt. 7.182.500,00 íroknað mvg, um kloakkleiðing verður løgd í atkomuvegin umframt eina árliga leigu til Búnaðarstovuna upp á umleið kr. 15.000. Leigumálið verður møguliga endurskoðað 5. hvørt ár.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina mæla til, at kostnaður fyri projektið verður sett av á ársfíggjarætlanini fyri 2013.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 19. juni 2012:** Málið útsett.

**Ískoyti:**
Búnaðarstovan hevur lagt fram ynski um, at kommunan grevur kava og saltar vegin frá landsvegnum oman til Búnaðarstovuna. Endalig støða er ikki tikin til hetta. Verkfrøðinagstovan, ið hevur projekterað moldmóttøkuplássið, hevur gjørt kostnaðarmeting fyri tað arbeiði, ið skal gerast fyri at moldmóttøkuplássið kann lata upp. Hetta er at roknað sum 1. av møguligum 5 byggistigum (kostnaðir uttan mvg):

| | |
|---|---|
| Atkomuvegur, uml. 650 m | 1.500.000,- |
| Vegur 1 við síðugreinum | 1.380.000,- |
| Vegur 2 uttan síðugreinar | 400.000,- |
| Ovasti vegur, st. 1 – 100 | 600.000,- |
| Skittvatnskloakk í atkomuveg, uml. 650 m | 400.000,- |
| Projekt + útboð | 220.000,- |
| **Kostnaður** | **4.500.000,-** |

Fylgjandi byggistig, um hildið verður fram, eru mett at kosta:

| | | |
|---|---|---|
| 2. byggistig | 2.120.000,- | |
| 3. byggistig | 2.120.000,- | |
| 4. byggistig | 2.175.000,- | |
| 5. byggistig | 1.220.000,- | |
| Samlaður kostnaður (íroknað 1. byggistig) | | 12.135.000,- |

1. byggistig kann lutvíst fíggjast av íløgukonto 7175 fyri renovasjón, har játtan til tyrvingarplássið á Glyvursnesi er, ið ikki verður brúkt í ár, áljóðandi kr. 2.369.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina mæla til, at kr. 2.369.000,- verða játtaðar av konto 7175 til moldplássið í Kollafirði og at arbeiðið verður boðið út, og at írestandi fígging av 1. byggistigi, ið sambært meting verður mett til 2.131.000,-, verður raðfest á íløguætlan fyri 2013.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 4. september 2012:** Nevndin samtykti at 2.369.000,- verða játtaðar av konto 7175 til moldplássið í Kollafirði og at írestandi fígging av 1. byggistigi, ið sambært meting verður mett til 2.131.000,-, verður raðfest á langtíðaríløguætlan og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt.

**230/12** **<u>2010-1319</u>**

**<u>Fimleikahøll til skúlan í Kaldbak</u>**

**Kaldbaksnevndin 19. mai 2010:** Nevndin ynskir at fáa eina fimleikahøll til skúlan, sum eisini kann brúkast til ítrótt, ítriv og sum borgarahús.

**Kaldbaksnevndin 24. november 2010:** Borgarstjórin beinir málið í mentamálanevndina.

**Kaldbaksnevndin 22. februar 2012:** Ynski er framhaldandi um at fáa eina politiska viðgerð av málinum, við tí fyri eyga at fáa málið raðfest á eini langtíðaríløguætlan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin vísa á, at eingin peningur er avsettur á íløguætlanini.

**Mentamálanevndin 14. mars 2012:** Samtykt at heita á umsitingina um at kanna møguligan tørv á fimleikahøll/felags hølum í bygdum kommununnar.

**Kaldbaksnevndin 29. mai 2012:** Borgarstjórin beinir málið í mentamálanevndina til víðari viðgerð.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fingið áheitan um at kanna møguligan tørv á fimleikahøll/felagshúsum í bygdum kommununnar. Bygdirnar Kaldbak, Nólsoy og Velbastað eru ymiskt fyri í mun til innandura ítróttaumstøður og almenn felags- ella bygdahús, sum ikki eru átrúnaðarlig samkomuhús. Harumframt eru kommunalir skúlar og dagstovnar.

Í nógvum bygdum verða felagshús nýtt til størri samkomur so sum brúdleyp, ervi, føðingardagar, bygdastevnur o.a.. Hesi felagshús eru oftast skipað av einum felag, tað veri seg bygdafelag, ítróttafelag, dansifelag osfr., sum eigur og rekur húsið, aloftast við sjálvbodnari megi. Í Havn eru nøkur kommunal býlingshús, sum í ávísan mun hava somu funktiónir.

Á Velbastað er felagshús, men eingin fimleikahøll. Í Nólsoy er felagshús og ein lítil fimleikahøll í skúlanum. Harumframt stendur ein grund til svimjihyl. Í Kaldbak er eingin fimleikahøll og einki felagshús.

Umsitingin skilur áheitanina soleiðís, at ynskt verður tilfar til víðari støðutakan um ætlan at byggja ella betra um felagsumstøður til innandura ítrótt og fjøltáttað felags tiltøk og virksemi í nevndu bygdum.

Til tess skal gerast ein tørvsgreining. Harumframt er neyðugt við uppskotum til, hvussu hetta best kann loysast í ymsu bygdunum í mun til funktiónir, og hvussu hetta í skitsum kundi tikið seg út, har talan er um at byggja nýtt. Gerast skal meting um íløgutørv og eftirfylgjandi rakstrarkostnað. Eisini er neyðugt at fáa lýsing av, hvussu verandi felagshús og karmar annars eru skipaði í dag – privat og kommunalt, og uppskot til, hvussu hetta eigur at verða skipað í framtíðini eisini við atliti at, hvussu hetta er skipað aðrastaðni í kommununi.

Sum tað áður er gjørt vart við, so er eingin játtan sett av á íløguætlanini til hetta endamál. Mett verður neyðugt at fáa uttanhýsis ráðgeving at standa fyri omanfyri lýstu tørvsgreining. Mett verður, at hóskandi upphædd er kr. 300.000. Skal tørvsgreiningin fremjast eftir hesum leisti, er neyðugt at flyta játtan frá øðrum verkætlanum. Uppskot er at flyta játtan frá ætlanini at byggja svimjifelagnum felagshøli L57009, tí mett verður, at hetta kann takast við í ætlanina at byggja nýggja svimjihøll L57015.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 300.000 til felagshús í bygdum kommununnar av íløgukontu 5775 ítróttaanlegg, L57009 svimjifelagið hølir.

**Mentamálanevndin 5. september 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt.

**231/12** **2007-0625**

**Eysturskúlin – høvuðsumvæling**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Húsaumsitingin er farin í holt við at umvæla Eysturskúlan. A og B lonirnar eru gjørdar, og nú vanta C, D og E lonirnar.

Húsaumsitingin saman við arkitektinum hava verið á fundi við leiðsluna í skúlanum fyrr í ár. Leiðslan ynskti at E lonin varð gjørd fyrst, tí tey mettu hesa verða mest átroðkandi. Nøkur vindeygu eru skrúvaðið føst fyri ikki at detta úr. Havandi í huga at hesi eisini virka sum fluktvegir út á takið, er skilagott at gera hetta arbeiðið fyrst.

Sambært fyribils kostnaðarmeting verður hetta arbeiðið mett at koma at kosta uml.10 mill. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at fara undir arbeiðið á E-lonina. Hetta merkir, at aftrat teimum 5 mill. kr,. sum Húsaumsitingin hevur sett av til Eysturskúlan í ár, verður neyðugt at kunna seta 5 mill. kr. av játtanina til konto 82 í komandi ár til Eysturskúlan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Húsaumsitingin hevur heitt á ráðgevan A3 v/Hans Dávid Dam, ark. og biðið hann gera útbjóðingartilfarið fyri C lonina umframt tekjurnar, sum leiðslan ynskti (ikki E lonin hetta er ein misskiljing).

Innboðin lisitatión varð hildin og inn komu 3 tilboð. Tilboðini lógu upp á 12,9, 14,3 og 17,7 mió. kr. Lægstur við kr 12.938.329,00 lá Sp/f Karstin A.Joensen, byggimeistari í Kollafirði. Meting okkara var 12.027.035 mió. kr.

Fyri lítlum ári síðani fingu vit samlað tilboð frá spf ÁTS fyri bygningspartarnar C, D og E, og var hettar upp 20,9 mió. kr. - Fyri bygningspart C + tekjurnar, skuldi hettar givið kr. 12,6 mió. kr.

Ráðgevin hevur mælt til at taka av lægsta tilboðnum. Umsitingin hevur gjørt samlaða kostnaðarmeting, íroknað ókent, prístalsreguleringar, prosjekt, eftirlit og byggileiðsla og mvg, og er samlaði kostnaðurin mettur at blíva kr. 16.633.839,22, (skjal 2007-0625/4).

Upprunaliga varð roknað við at játtanin til hetta arbeiði skuldi verða av konto 82, umsiting av bygningum. Men í samband við fíggjarætlan fyri 2008 var avgjørt at talan var ikki um vanligt viðlíkahald, men heldur um eina íløgu í dagføring, og var tí avgjørt at játtanin fyri 2008 til hetta arbeiði skal av íløgum fyri 2008.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at tikið verður av lægsta tilboðnum, og at játtaðar verða kr. 16.633.839,22 av íløgum fyri 2008, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2007:** Útsett.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at tilboðið, sum víst verður til í tilmælinum omanfyri, verður fíggjað av íløgum fyri 2008 kr. 13.785.000,00, restupphæddin kr. 2.848.839,22 verða goldnar av konto 82, umsiting av bygningum, skúlamál.

**Mentamálanevndin 2. apríl 2008:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 13.785.000,00 av íløgum fyri 2008.

**Fíggjarnevndin 16. apríl 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 24. apríl 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
C lonin í Eysturskúlanum var liðugt høvuðsumvæld í 2008, sostatt eru A, B og C lonirnar umvældar.
Tá umvælingin av C lonini var liðug, varð í samráð við skúlan avgjørt at bíða eina tíð við framhaldandi umvælingunum, tí skúlin metti, at høvuðsumvælingin órógvar dagliga arbeiðið í skúlanum so mikið, at tørvur var á einum steðgi í eini tvey ár.

Tann tíðin er farin nú, og mælt verður tí til, at høvuðsumvælingin verður tikin upp aftur, og at farið verður í gongd við D lonina.

Ráðgevin metir, at kostnaðurin fyri projekteringina er 314.000 kr. uttan mvg. Við mvg og við at leggja nakað aftrat til óvæntað, verður metti kostnaðurin fyri at projektera liðugt og gera klárt til útboð 370.000 kr.

Gerast skal ein ráðgevarasáttmáli um projektering og eftirlit við høvuðsumvælingini. Ráðgevin, sum tók sær av hesi uppgávu, tá hinar lonirnar vórðu umvældar, hevur neyva vitan um bygningin og verkætlanina sum heild, og tí verður viðmælt, at heimild verður givin at gera sáttmála við hann aftur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at heimild verður givin at gera sáttmála við ráðgevan, sum tók sær av hesi uppgávu, tá hinar lonirnar vórðu umvældar.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at 370.000 kr. verða játtaðar av konto 4175, Dagføring av skúlum, til projektering av høvuðsumvæling av D lonini í Eysturskúlanum, soleiðis at hetta umvælingarstigið kann bjóðast út.

**Mentamálanevndin 1. desember 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og játta kr. 370.000 av íløguætlanini fyri 2011.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Fundur hevur verið við leiðsluna í Eysturskúlanum um høvuðsumvælingina av D-lonini. Á fundinum greiddi ráðgevin frá umvælingarætlanini, og skúlin hevði møguleika at gera viðmerkingar.

Ráðgevin hevur projekterað og gjørt kostnaðarmeting. Høvuðsumvælingin fevnir í høvuðsheitum um útveggir, máling innan, nýtt linoleum á gólvini, eftirbjálving, bøtta brunatrygd, gardinur, hitaskipan, el-hurðalæsiskipan og goymslurúm til klor, sum verður brúkt í svimjihylinum.

Sambært kostnaðarmeting, sum er í málinum, verður samlaði kostnaðurin kr. 11.572.412,11.

Ætlanin er at fara í gongd við umvælingina í august 2012, og arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 11.572.500 kr. av konto 4175, Dagføring av skúlum, til høvðusumvælingina av D-lonini í Eysturskúlanum

**Mentamálanevndin 13. juni 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Arbeiðið hevur verið boðið út í innbodnari lisitatión. Inn komu fýra tilboð, og var lisitatiónin mikudagin 27. august 2012.

Úrslitið varð:

| Arbeiðstakarar | Tilboð uttan mvg |
|---|---|
| P/f Articon | kr. 7.110.925,00 |
| Sp/f Bjarni Poulsen | kr. 8.373.795,00 |
| Sp/f Karstin A. Joensen | kr. 6.711.394,00 |
| Sp/f Húsavarðartænastan | kr. 7.969.578,00 |

Ráðgevin hevur kannað tilboðini og mælir til at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi kr. 6.711.394,-

Býráðið hevur áður játtað hesar upphæddir til umvælingararbeiðið:

| | |
|---|---|
| 16. des. 2010: | kr. 370.000,00 |
| 28. juni 2012: | kr. 11.572.412,11 |
| Tils. | kr. 11.942.412,11 |

Umsitingin hevur eftirfylgjandi gjørt samlaða kostnaðarmeting fyri alt arbeiðið, íroknað handverkaraútreiðslur, inniklima, projektering, eftirlit, byggileiðslu, prístalsregulering, prosjektumsiting, ókent og mvg, j. nr. 2012-0511/22, og metir, at arbeiðið kann gerast innanfyri áður játtaða fíggjarkarmin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av lægsta tilboðnum, at heimila umsitingini at taka upp samráðingar og gera sáttmála við lægsta tilboðsgevaran, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 5. september 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt.

**232/12** **2010-2007**

**Dagstovnurin í Hoyvík**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Fyri eini tíð síðani varð staðfest, at Dagstovnurin í Hoyvik er fongdu av blámusoppi. Royndir vóru tiknar til tess at staðfesta vavið av blámusoppafongdu økjunum. Og út frá hesum varð gjørt útbjóðingartilfar til timburarbeiðið. Arbeiðið verður gjørt í stigum soleiðis, at ein lon verður gjørd í senn.

Samlaða kostnaðarmetingin ljóðaði tá uppá 6,4 mió. u. mvg, sum Húsaumsitingin eftir ætlan skuldi rinda av síni viðlíkahaldsjáttan fyri 2011 og 2010.

Nú veggir, gólv o.a. er niðurtikið kann staðfestast, at vavið av soppafongdu økjunum er munandi størri enn upprunaliga kanningarnar góvu ábending um. Tað er stórt sæð øll lonin, sum er soppafongd. Harumframt kann staðfestast, at fukt treingir upp gjøgnum gólvið. Helst hevur hetta verið so líka síðani bygningurin varð bygdur. Og nógvu lekarnir og soppavøksturin hava eisini viðført, at partar av berandi takkonstruktiónini er rotin og má skiftast út.

Vavið av umvælingararbeiðinum er tí vaksið munandi. Sambært eini dagførdari kostnaðarmeting grundað á vavið av skaddu økjunum, sum staðfest eru í fyrstu lonini, væntast umvælingarkostnaðurin nú at liggja upp ímóti 12 mió. kr. u. mvg.

Tá er framvegis ikki heilt greitt, um tað harumframt verður neyðugt at leggja nýtt takpapp á allan bygningin, og somuleiðis eru trupulleikar við lekum kring yvirljósini, sum ikki eru loystir enn. Hesi ting eru ikki við í kostnaðarmetingini.

Húsaumsitingin hevur ikki fíggjarligar umstøður til at bera ein enn størri part enn tær kr. 6 mió, sum upprunaliga ætlað. Ein loysn er, at írestandi peningurin verður funnin við umraðfestingum á íløguætlanini.

Skal arbeiðið halda fram, er neyðugt at játta meirfígging skjótast.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2011:** Kunnað varð um málið.

**Býráðið fyri læsum hurðum 14. apríl 2011:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 4. mai 2011:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Niðanfyri er yvirlit yvir íløgujáttanir, sum mett verður kunnu vera vit til at fíggja meirkostnaðin av umvælingararbeiðinum.

**Dagstovnur í Hoyvík - meirfíggingartørvur uml. 6 mió kr.**

| | Projektnr. | Upphædd |
|---|---|---|
| **§ 3 Børn og ung** | | |
| Løgukarmur (frítíðarskúli) | - | 1.000.000 |
| FTS í Gula skúla | L31002 | 242.000 |
| **§ 5 Mentan og frítíð** | | |
| Musikkskúlin | L51002 | 3.800.000 |
| Spælipláss í Grasagarði | L53001 | 150.000 |
| Íløgukarmur (badmintonhøllin) | - | 240.000 |
| Tórsvøllur | L57008 | 4.538.000 |
| Ítróttahøllin í Kollafirði | L57011 | 1.500.000 |
| **§ 6 Teknisk mál** | | |
| Íløgukarmur (fríðkan) | - | 331.000 |
| Kongabrúgvin | L62012 | 996.000 |
| Vaglið | L62014 | 997.000 |
| Frílendi til borgaran | L62015 | 217.000 |
| Løgukarmur (kirkjugarðar) | - | 1.000.000 |
| Løgukarmur | - | 396.000 |
| Keyp og søla | - | 1.500.000 |
| **§ 7 Kommunal virkir** | | |
| Útbúnaður á bátaøkinum | L74002 | 5.848.000 |
| | | |
| **Í alt** | | **22.755.000** |

**Mentamálanevndin 18. mai 2011:** Nevndin samtykti at biðja um gjølla frágreiðing um, hvussu tað ber til, at skaðin á húsið er so nógv kostnaðarmeiri enn mett varð í fyrstani.

Nevndin samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina til at játtaðar verða umleið 6 mió krónur aftrat til umvælingina av Dagstovninum í Hoyvík soleiðis:

| | |
|---|---|
| Løgukarmur (frítíðarskúli) | 1.000.000 |
| FTS í Gula skúla | 242.000 |
| Badmintonhøllin | 240.000 |
| Keyp og søla | 1.500.000 |
| Húsaumvæling | 2.500.000 |
| B&U økt virks (rakstur) | 500.000 |

**Fíggjarnevndin 24. mai 2011:** Deildarleiðarin í Húsaumsitingini greiddi frá málinum. Samtykt at mæla býráðnum til við eykajáttan at játta tkr. 12.000 av íløgum á konto 3175, barnaansing íløgur.

Íløgan verður fíggjað við niðanfyri standandi flytingum:

tkr.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 3175 | FTS, Løgukarmur | Lækking | -1.000 |
| 3175 | FTS, Guli skúli | Lækking | -242 |
| 5775 | Ítróttaranlegg løgukarmur | Lækking | -240 |
| 6175 | Keyp og søla av fastari ogn | Lækking | -1.500 |
| 6110 | Røkt av bygningum | Lækking | -8.518 |
| 3214 | Børn og ung, Umvælingar o.a. | Lækking | -500 |
| 3175 | Dagstovnurin í Hoyvík | Hækking | 12.000 |

**Býráðið 26. mai 2011:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. juni 2011:** Nevndin samtykti at útseta málið til komandi fund.

**Fìggjarnevndin 15. juni 2011:** Tikið av skrá.

**Býráðið 16. juni 2011:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini hava við útgangsstøði í fíggjarstøðuni hjá Húsaumsitingini, mett um hvussu Húsaumsitingin kann luttaka í kostnaðinum fyri heildarumvælingina av dagstovninum í Hoyvík.

Í mun til samlaða metta kostnaðin á kr. 12 mió., metir húsaumsitingin seg kunna átaka sær knappliga 60%, svarandi til 7,0 mió. kr.

Henda upphædd verður fíggjað soleiðis:

| | |
|---|---|
| Av framfluttum avlopi frá 2010: | kr. 4.500.000,- |
| Flyting av avlopi frá 2010, ætla til Müllers Pakkhús: | kr. 300.000,- |
| Avsett á fíggjarætlan til røkt av bygninginum í 2011: | kr. 800.000,- |
| Flutt frá røkt av Kommunuskúlanum á fíggjarætlan 2011: | kr. 500.000,- |
| Flutt frá røkt av Hoyvíkar skúla á fíggjarætlan fyri 2011: | kr. 500.000,- |
| Innanhýsis umraðfesting fyri røkt av dagstovnum | kr. 250.000,- |
| Innanhýsis umraðfesting av røkt av mentunar-bygningum á fíggjarætlan fyri 2011 (Móttøku-húsinum og Müllers Pakkhús): | kr. 150.000,- |
| Tilsamans | kr. 7.000.000,- |

Samlaða fíggingin sum umsitingin sostatt kann vísa á, og írestandi fíggingin er sostatt henda:

| | Blað nr.: **10022** |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**13. september 2012** | Formansins merki: |

## Uppskot frá trivnaðarumsitingini, teknisku umsiting og miðfyrisitingini:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 3175 | FTS, Løgukarmur | Lækking | -1.000 |
| 3175 | FTS, Guli skúli | Lækking | -242 |
| 5775 | Ítróttaranlegg løgukarmur | Lækking | -240 |
| 6175 | Keyp og søla av fastari ogn | Lækking | -1.300 |
| 6110 | Avsett á fíggjarætlan til røkt av bygninginum í 2011 | Lækking | -800 |
| 6110 | Røkt av bygningum | Lækking | -4.500 |
| 6110 | Røkt av bygningum | Lækking | -300 |
| 6110 | Flutt frá røkt av Kommunuskúlanum á fíggjarætlan 2011 | Lækking | -500 |
| 6110 | Flutt frá røkt av Hoyvíkar skúla á fíggjarætlan 2011 | Lækking | -500 |
| 6110 | Innanhýsis umraðfesting fyri røkt av dagstovnum | Lækking | -250 |
| 6110 | (Móttøkuhúsið 50 tús og Mullers Pakkhús 100 tús) | Lækking | -150 |
| 3214 | Børn og ung, Umvælingar o.a. | Lækking | -500 |
| | **Tilsamans** | | **-10.282** |
| **3175** | **Dagstovnurin í Hoyvík** | **Hækking** | **10.282** |

## Býtið millum økir/nevndir

| | |
|---|---|
| Mentamálanevndin | -1.982 |
| Byggi- og býarskipanarnevndin | -7.000 |
| Fíggjarnevndin | -1.300 |
| | **-10.282** |

## Írestandi fígging

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Kostnaðarmeting | | -12.000 |
| | Umraðfestingar | | 10.282 |
| | **Írestandi fígging at finna innan umraðfestingar av íløgum** | | **-1.718** |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla til fígging av kr. 10.282.000 sambært omanfyristandandi ískoyti, og at írestandi fíggingin á kr. 1.718.000 verður funnin innan umraðfestingar av íløgum.

Somuleiðis verður mælt til, at eitt møguligt avlop í mun til kostnaðarmetingina á 12 mió, fellur aftur til tær konti sum verða lækkaðar, við tí býtislutfalli tær luttakað í samlaða kostnaðinum.

**Mentamálanevndin 21. juni 2011:** Samtykt at mæla til at játta kr. 10.282.000 sambært omanfyristandandi yvirliti og at málið um møguliga restfígging verður tikið upp aftur tá annar partur av umvælingini er liðugur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. juni 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 23. juni 2011:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtykt í mentamálanevndina 21. juni 2011, og í fíggjarnevndini og býráðið 23. juni 2011, tá avgjørt varð at taka spurningin um írestandi fígging upp aftur tá betur yvirlit var yvir støðuna í lon 2 og 3 enn tað var á sumri 2011, tá tað bert var arbeitt í Lon 1, varð við ársenda 2011 gjørd ein dagførd kostnaðarmeting, tá arbeiðið var komið longur áleiðis (dagførd kostnaðarmeting j. nr. 2010-2007/73).

Játtaðar vóru í fyrstu atløgu kr. 10,282 mió.

Sparingar hava alla tíðina verið ein partur av uppgávuni og er eisini blivið spart har tað hevur borið til. Men eitt so umfatandi arbeiði, við so nógvum ókendum faktorum sum henda umvæling hevur havt, ger tað sera trupult at leggja upp fyri øllum hugsandi útreiðslum.

Nú fyriliggur so ein dagførd kostnaðarmeting av sjálvum arbeiðinum sum vísir, at handverkaraútreiðslurnar verða mettar til kr. 11,5 mió u. mvg. Við hesum sum grundarlag hevur umsitingin í samráð við ráðgevan, gjørt eina samlaða kostnaðarmeting, har projektering, eftirlit, prístalsviðgerð, prosjektumsiting og mvg er íroknað, og verður samlaði kostnaðurin mettur til kr. 14,3 mió.

| | | |
|---|---|---|
| handverkara útr | kr. | 11.456.366,00 |
| ráðgeving | kr. | 1.603.612,00 |
| prístalsviðgerð | kr. | 152.765,66 |
| | kr. | 13.212.743,66 |
| prosjektumsiting | kr. | 264.254,87 |
| mvg 6,25% | kr. | 825.796,48 |
| **Kostnaður í alt** | **kr.** | **14.302.795,01** |
| **Áður játtað** | **kr.** | **10.282.000,00** |
| **Írestandi fígging** | **kr.** | **4.020.795,01** |

Umfatandi eykaarbeiði, harav nógv longda byggitíðin, vetrartiltøk o.a. eru viðvirkandi orsøkir til økta kostnaðin.

Longda byggitíðin hevur m.a. viðført nógv øktar útreiðslur til leigu av ymiskari útgerð, eitt nú skúrar, bingjur, hegn, útsúgving og ymiskt annað.

Vetrartiltøkini, fyri at kunna arbeiða uttandura vetrarhálvuna, hava eisini verið umfatandi.

Meirkostnaðurin stavar í høvuðsheitum frá góðkendum meirarbeiði sum til dømis køkar, reingerðing vetrarátøk, umframt at HVS, EL og málaraarbeiði er blivið munandi meira umfatandi.

Arbeiðið líður nú so mikið væl, at spurningurin um írestandi fíggingina tí nú má takast upp aftur av mentamálanevndini, fíggjarnevndini og býráðnum.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Konto 6110, undir Húsaumsitingini, hevur frammanundan goldið kr. 7,0 mió av samlaða kostnaðinum. Við støðið í eini uppgerð fyri konto 6110 fyri roknskaparárið 2011 er komið til ta niðurstøðu, at avlopið er 1,4 mió kr. størri enn upprunaliga mett, og verður tí mælt til at flyta hesa upphædd til dagstovnin í Hoyvík, konto 3175 proj. nr. L31003.

Eftir at fíggja verða sostatt kr. 2,6 mió. Skotið verður upp, at hetta verður fíggjað við rakstraravlopum á niðanfyri standandi kontum fyri 2011:

| | | |
|---|---|---|
| 1313 | Tekniska fyrisiting | 600.000 |
| 5510 | Tórshavnar býarsavn | 183.000 |
| 2211 | Heilsufrøðiskipan | 100.000 |
| 2102 | Sjúkrakassaeftirstøður | 150.000 |
| 3101 | Dagrøktin | 700.000 |
| 3213 | Systkinaavsláttur rakstur | 338.000 |
| 4144 | Skúlabarnaflutningur | 450.000 |
| 1315 | Nevndir og ráð | 100.000 |

Saman við teimum 1,4 mió kr. frá Húsaumsitingini, gevur hetta 4.021.000 kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og miðfyristingarstjórin mæla til fígging av 4.021.000 kr. sambært omanfyri standandi ískoyti, og at henda upphædd verður játtað sum eykajáttan til 3175 L31003 Dagstovnurin í Hoyvík av omanfyri nevndu rakstrakontum í alt 4.021.000.

Somuleiðis verður mælt til, at eitt møguligt avlop í mun til kostnaðarmetingina á 12 mió kr. fellur aftur til tær kontur, sum verða lækkaðar, við tí býtislutfalli tær luttaka í samlaða kostnaðinum.

**Mentamálanevndin 11. januar 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Rúni Djurhuus samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á einum seinni fundi.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Elin Lindenskov, mælir býráðnum til at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Bogi Andreasen, tekur støðu á seinni fundi.

Ein samd nevnd heitir á kommunustjoran um at útvega nevndini eina gjølliga frágreiðing um samlaðu gongdina í umvælingarmálinum.

**Býráðið 26. januar 2012:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Rúni Djurhuus.

Greiddu ikki atkvøðu: Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Inga Dahl, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2012:** Kommunustjórin legði fram frágreiðing um gongdina í málinum, ið verður at leggja fyri býráðið.

**Býráðið 23. februar 2012:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Rúni Djurhuus.

Greiddu ikki atkvøðu: Bogi Andreasen, Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**Fíggjarnevndin og mentamálanevndin 20. juni 2012:** Trivnaðarstjórin og leiðarin á húsaumsitingini kunnaðu um málið.

Leiðarin á húsaumsitingini kunnar um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Í sambandi við liðugtgerð av umvælingunum á Dagstovninum í Hoyvík er komið á m.a. ymisk fjald brek, sum neyðugt hevur verið at umvæla fyri at fáa eitt nøktandi úrslit. Nevnast kann, at upprunaligu takbrunnarnir hava ongantíð virkað, gomul el-armaturir brotnaðu, tá tey vóru tikin niður, og máttu tí útskiftast, og gamlir feilir vóru í HVS-skipanini, sum máttu umvælast. Samanumtikið kann staðfestast, at fleiri fjald brek hava verið við bygninginum líka síðani hann var bygdur, og hava helst verið viðvirkandi orsøk til teir soppatrupulleikar, sum hava verið við bygninginum. Fremst í málslýsingini til fundin í fíggjarnevndini 14. apríl 2011 er eisini víst á, at umvælingar av takpappinum vóru ikki við í arbeiðinum, og at umfangið at útskifting av takpappinum ikki var greitt tá. Nærri kanningar seinni vístu, at neyðugt var at skifta stóran part av takpappinum, og er tað tí eisini blivið gjørt.

Undir vanligum umstøðum vildu fleiri av hesum brekum verið umvæld og goldin av rakstrarjáttanini til viðlíkahald hjá Húsaumsitingini. Men nú, ið hesar umvælingar eru gjørdar, samstundis sum so nógv annað og umfatandi arbeiði er á stovninum, ber illa til at skilja samlaðu peninganýtsluna til íløgupartin og til viðlíkahaldspartin sundur. Sambært byggiroknskapinum er samlaði kostnaðurin fyri tær íløgur, sum nú eru gjørdar á stovninum, og umvælingarnar av teimum fjaldu brekum, sum eru komin undan kavi, kr. 15.695.288. Býráðið hevur fyrr játtað kr. 10.282.000 og 4.021.000 = 14.303.000 til íløgupartin. Til tess at rinda samlaðu upphæddina fyri íløgurnar og viðlíkahaldspartin á kr. 15.695.288, verður mælt til at flyta kr. 1.392.493 av rakstrarjáttanini hjá Húsaumsitingini, konto 6110, til konto 3175, proj. nr. L31003, Dagstovnurin í Hoyvík.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og miðfyristingarstjórin mæla til fígging av 1.392.493 kr. sambært omanfyri standandi ískoyti, og at henda upphædd verður játtað sum eykajáttan til íløgukonto nr. 3175, proj. nr. L31003 Dagstovnurin í Hoyvík av omanfyri nevndu rakstrakontu 6110 Røkt av bygningum, og at loka verkætlanina.

**Mentamálanevndin 26. juli 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Maria H. Olsen, Elin Lindenskov og Vagnur Johannesen taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Annfinn Brekkstein tekur støðu á seinni fundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juli 2012:** Ein meiriluti: Levi Mørk, Elin Lindenskov og Jákup Símun Simonsen samtykti at taka undir við mentamálanevndini.

Ein minniluti: Bogi Andreasen og Jan Christiansen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 26. juli 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Elin Lindenskov, mælir býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og byggi- og býarskipanarnevndini.

Ein minniluti, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 26. juli 2012:** Samtykt við átta atkvøðum fyri. Tríggir býráðslimir greiddu ikki atkvøðu og ein atkvøddi ímóti.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Jógvan Arge, Levi Mørk, Marin Katrina Frýdal, Jákup Símun Simonsen, Maria H. Olsen og Vagnur Johannesen.

Tey, ið ikki greiddu atkvøðu, vóru Annfinn Brekkstein, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Bogi Andreasen atkvøddi ímóti grundað á, at hann heldur talan vera um eina íløgu og ikki rakstur.

**Ískoyti:**
Á mentamálanevndarfundi 11. januar 2012, varð samtykt at flyta kr. 700.000 av rakstraravlopinum 2011 hjá dagrøktini konto 3101 til Dagstovnin í Hoyvík, av misgáum er hetta komið skeivt fyri, peningurin skal flytast av Reiðrinum konto 3110. Reiðrið er ein vøggustova, ið liggur undir dagrøktini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri børn og ung, mæla mentamálanevndini til, at kr.700.000 verða játtaðar av konto 3110 "Reiðrið" til Dagstovnin í Hoyvík, og ikki sum samtykt av konto 3101 "Dagrøktin".

**Mentamálanevndin 5. september 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt.

233/12 2012-0903

**Umsókn frá Fótbóltssambandi Føroya um nýggjan bygning við suðurendan á Tórsvølli**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Í umsókníni stendur m.a.:

“Á fundi 28. mars 2012 samtykti starvsnevnd Fótbóltssamband Føroya uppskot frá MAP arkitektum um nýggjan bygning við suðurendan á Tórsvølli. Bygningurin er partur av heildarætlanini fyri økið, sum Tórshavnar kommuna og FSF gjørdu í felag.

Ætlanin við nýggja bygninginum er at skapa eitt natúrligt savningarstað til Tórsvøll, umframt at betra hølisviðurskiftini hjá FSF umsitingini. Bygningurin kemur eisini at tryggja, at fyrstu áskoðararnir á Tórsvølli koma undir tak, samstundis sum fríðkað verður um økið og Tórsvøll.

Verkætlanin við nýggja bygninginum við Tórsvøll er av slíkari stødd, at Fótbóltssambandið ikki er ført at gjøgnumføra hana einsamælt. FSF metir, at bygningurin kemur at geva økinum og Tórshavnar býi nógv, og tí átti tað at verið av áhuga hjá Tórshavnar kommunu at verið viðleikari í hesi verkætlan." (...)

Verkætlanin er mett at kosta 27.786.000 kr. Um tað fíggjarliga skrivar Fótbóltssamband Føroya í umsókníni:

"Fótbóltssamband Føroya fær stuðul úr HatTrick grunninum hjá UEFA til íløgur til leikvøllir v.m. Hesin grunnur hevur longu verið við at fíggja nýggju ljósmastrarnar og heildarætlanina (12,9 mió kr.) og nýggja graslíkið á Tórsvølli (4,5 mió kr.).

Grunnurin er tó avmarkaður, og tí er ikki møguligt at fíggja nýggja húsið einans gjøgnum HatTrick grunnin. FSF ynskir tí, at TK er við at fíggja og mynda verkætlanina

Fótbóltssambandið mælir til, at TK stuðlar verkætlanini við 10 mió kr., meðan FSF rindar hinar 18 mió kr.

Fyri tær 10 mió kr., sum TK leggur í verkætlanina, fær kommunan rættindi til 1. hædd í bygninginum. Hóast hetta kann tykjast sum ein dýrur prísur fyri 740 óinnrættaðar fermetrar, so metir FSF, at bygningurin kemur at hava stóra, positiva ávirkan á økið, og sostatt økja virðið á bygningum í grannalagnum.

Sum eitt alternativ til nevndu fíggjarloysn, skjýtur Fótbóltssambandið upp, at TK rindar FSF 10 mió kr. fyri ljósmastrarnar við Tórsvøll, sum upprunaliga kostaðu

FSF 12,4 mió kr. Um TK er áhugað í hesi loysn, bindur FSF seg til at byggja nevnda hús við suðurendan á Tórsvølli fyri 28 mió kr."

Í avtaluni, sum FSF og Tórshavnar kommunu skrivaðu undir 26. juli 2011 í sambandi við útbyggingina av ljósanlegginum til Tórsvøll, var í endamálsgreinini ásett ein tilgongd fyri samstarvið um útbygging av Tórsvølli. Nú graslíkið verður gjørt, er bert eitt punkt eftir, og tað er yvirdekking av tribununum bæði á eystur- og vestursíðuni, so at áskoðararnir kunnu sita vardir fyri veðrinum.

Samstarv um nýggjan bygning á suðurendanum er ikki avtalað í tilgongdini, og tó at ein bygningur har er í samsvari við heildarætlanina og er positivt íkast til heildarmyndina av Tórsvølli, so verður vikið frá raðfylgjuni, ið útbyggingartilgongdin skuldi hava sambært avtaluni. Metast má frá kommunalum sjónarmiði týðandi at raðfesta áskoðaraumstøðurnar á báðum langsíðunum frammaliga, tvs., at størra fjøldin kemur undir tak og í aðrar mátar fær munandi betri umstøður.

Í mun til heildarætlanina annars eru nøkur atlit at taka í mun til nýggja bygningin hjá FSF, tí eftir ætlan flytir FSF ymsar funktiónir, sum sambært heildarætlanini skulu vera á vestursíðuni, har verandi FSF bygningur er, í nýggja bygningin á suðurendanum. Hvussu nýggi bygningurin kemur at ávirka funktiónstørvin serliga á vesturtribunini ítøkiliga er ikki greitt, men verður hetta í løtuni útgreinað.

Eisini er spurningur, um kommunan skal gjalda fyri rættindi til eina hædd í bygninginum. Mett verður skilabetri, at FSF sjálvt eigur bygningin, og at kommunan í staðin endurrindar FSF íløguna í ljósmastrarnar. Til tess er neyðugt at seta játtan av til endamálið á íløguætlanini.

Leyslig meting er, at samlaði kostnaðurin at dagføra og útbyggja Tórsvøll til altjóða stadion við yvirdekkaðum tribunum, nýggjum FSF bygningi v.m., verður omanfyri kr. 100 mió yvir eitt 4-5 ára tíðarskeið. Neyðugt er, at bæði FSF og kommunan leggja greiðan og bindandi leist fyri, hvussu útbyggingin fer fram eisini við atliti at teimum krøvum, ið altjóða fótbóltssamgongurnar seta til landsliðsstadion, og hvussu hetta verður fíggjað yvir árini, eisini við at brúka eksternar stuðulsmøguleikar.

Somuleiðis er umráðandi, at kommunan og FSF fáa lýst, hvussu og til hvat Tórsvøllur sum vøllur og stadion kann nýtast til, fyri at tryggja eina støðuga nýtslu, sum kann verða við til at bera rakstrarkostnaðin fyri Tórsvøll, og sum kemur at viðføra støðuga nýtslu og virksemi í økinum, til gagns fyri býin.

Samanumtikið verður mett, at málið um nýggjan bygning við sunnara enda er ikki klárt til endaliga støðutakan og kann ikki viðgerast sjálvstøðugt, men eigur at viðgerast við atliti at eini heildarloysn fyri Tórsvøll.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:

- at gera endaliga og bindandi avtalu við FSF um øll komandi útbyggingarstigini at gera Tórsvøll lidnan sum altjóða stadion,
- at seta ein skjóttarbeiðandi arbeiðsbólk við umboðum fyri kommununa, FSF og ráðgeva at lýsa møguleikarnar fyri skipan av funktiónunum á Tórsvølli við støði í ætlanum og ynskjum hjá kommununi og FSF eins og krøvum til stadion, herundir at gera ætlan fyri byggistig og tíðarætlan, fíggingarleist við fígging frá FSF, kommununi og øðrum fíggingarmøguleikum, og
- at hetta verður lagt fyri kommununa til politiska viðgerð og fyri FSF í seinasta lagi 20. august 2012.

**Mentamálanevndin 13. juni 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Samsvarandi omanfyri standandi er nú gjørd samlað útbyggingarætlan við kostnaðar- og tíðarætlan fyri at gera Tórsvøll lidnan sum altjóða stadion. Ætlanin fevnir um trý útbyggingarstig, sum í høvuðsheitum fylgir heildarætlanini (masterplaninum) frá 2011:

1) At taka niður áskoðaraplássini á suðursíðuni og byggja nýggjan FSF-bygning á hesum stað, og at fáa áskoðaraplássini á eystursíðuni undir tak við tilhoyrandi hølum og hentleikum (eysturskýlið)
2) At fáa áskoðaraplássini á vestursíðuni undir tak við tilhoyrandi hølum og hentleikum (vesturskýlið)
3) At gera torg á sunnaru síðu og byggja oman á FIMI

FSF-bygningurin er mettur at kosta kr. 36 mió at byggja. Tá er íroknað niðurtøka av verandi áskoðaraplássum, fundering og full innrætting av øllum hæddum. Eysturskýlið við hølum til almenningin (sølubúðir, vesir v.m.), lyft og parkeringsumstøður er samlað mett at kosta kr. 48 mió, harav sjálvt skýlið er mett til kr. 35 mió. Samlaða kostnaðarmetingin fyri fyrsta útbyggingarstigið er sostatt kr. 84 mió. Tíðarætlanin fyri hetta byggistigið er 2012-2015.

Annað útbyggingarstig er vesturskýlið, sum er mett at kosta kr. 64 mió. Seinasta útbyggingarstigið er torgið og atkomuviðurskiftini frammanfyri stadion og útbyggingin av FIMI.

Útgangsstøðið hjá FSF og kommununi fyri at fáa hesa byggiætlan framda er framhald av samstarvinum, sum partarnir hava havt í sambandi við masterplanin, ljósmastrarnar og graslíkið á Tórsvølli. Hetta merkir, at ítøkilig avtala skal gerast fyri einstøku útbyggingarnar og um býtið av fíggingini partanna millum.

Ásannandi, at talan er um stóra byggiætlan, hevur í fyrireikingunum eisini verið umrøtt at fáa til vega fígging frá fíggingar- og vinnugrunnum til verkætlanina. Av tí sama er ítøkiligi fíggingarleisturin ikki endaliga greiður, tvs., hvussu býtið millum partarnar av íløgukostnaðinum verður.

Í ætlan er sostatt nýggj avtala við FSF, sum tekur støði í teimum trimum útbyggingarstigunum, men har avtalan annars fevnir um fyrsta útbyggingarstigið ítøkiliga, har íløgutørvurin er kr. 84 mió umframt kr. 1,5 mió til projektleiðslu.

Til tess at fyrireikingararbeiðið kann halda fram og verkætlanin leggjast fyri býráð, FSF og UEFA til víðari støðutakan og útvegan av fígging, er í fyrstu atløgu neyðugt við prinsippiellari støðutakan til útbyggingarætlanina sum heild og serliga fyrsta stigið, har bygningurin á suðursíðuni og eysturskýlið standa liðugt í 2015 fyri í mesta lagi kr. 84 mió kr. umframt projektleiðslu.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til prinsippiella góðkenning av útbyggingarætlanini sum heild, har fyrsta stigið er bygningurin á suðursíðuni og eysturskýlið at standa liðugt í 2015 fyri í mesta lagi kr. 84 mió kr. umframt projektleiðslu.

**Mentamálanevndin 5. september 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum við tí ískoyti at Tórshavnar kommuna útvegar upp til 35 mió. kr. árini 2013-2015

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Sjúrður Olsen, mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá mentamálanevndini.

Ein minniluti, Bogi Andreasen, tekur ikki undir við tilmælinum, og mælir býráðnum til, at málið verður viðgjørt í sambandi við íløguætlanina fyri 2013.

**Býráðið 13. september 2012:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal, um at beina málið í fíggjarnevndina og taka tað upp í sambandi við fíggjarætlanina fyri 2013 og langtíðaríløguætlanina, ið fall við tveimum atkvøðum fyri og 9 ímóti.

Fyri atkvøddu: Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Jákup Símun Simonsen, Levi Mørk, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og tveimum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Jákup Símun Simonsen, Levi Mørk, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen

Ímóti atkvøddu: Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen

**234/12** **<u>2012-2064</u>**

**<u>Broyting av fundats Nuuk-Reykjavík-Tórshavn</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Viðgerð av uppskot til broyttan fundats, sum varð samtyktur á grunnafundi 10. mai 2012.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til broyttan fundats.

**Býráðið 13. september 2012:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**235/12** **<u>2011-1622</u>**

**<u>Skriv frá Kvívíkar kommunu um samanlegging við Tórshavnar Kommunu</u>**

**Býráðið 13. september 2012:** Atkvøtt var um Tórshavnar og Kvívíkar kommuna skuldu leggja saman, ið fall við ongari atkvøðu fyri og 5 ímóti.

Ímóti atkvøddu: Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Jákup Símun Simonsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Heðin Mortensen, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen.

# Kunningarmál

**236/12** **<u>2008-1294 (sí eisini j. nr. 2005-2344) EY</u>**

**<u>Nevndarsamtykt: Dagføring av Sundsvegnum frá Vestara Ringvegi til Innkomuvegin til Havnar</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Ráðgevingarfyritøkan Rambøll Nyvig hevur gjørt eina ferðslugreining í sambandi við nýggja Innkomuvegin til Havnar, sí j. nr. 2008-1292/1. Í framtíðini verður ársdøgnmiðalferðslan eftir Sundsvegnum umleið 18.000 akfør.

Tekniska fyrisitingin er komin til ta niðurstøðu á innanhýsis fundi, at tað er neyðugt at dagføra verandi vegastrekki frá Vestara Ringvegi til Innkomuvegin til Havnar. Víst verður til kort av verandi Sundsvegi, sí j. nr. 2008-1293/1.

Neyðugt er at biðja ráðgevingarfyritøku gera eitt dispositiónsuppskot av eini dagførdari linjuføring av Sundsvegnum. Eitt tílíkt uppskot er mett at kosta umleið kr. 500.000,-.

Í hesum sambandi fer umsitingin at heita á teknisku nevnd, umvegis fíggjarnevndina og býráðið, at játta neyðuga peningin til endamálið.

Tekniska nevnd skal taka støðu til fygljandi
1. Játta kr. 500.000,- til dispositiónsuppskot
2. Skal projekteringsarbeiðið bjóðast út?

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 500.000,- til dispositiónsuppskot umvegis fíggjarnevndina og býráðið, og at bjóða projekteringsarbeiðið út til fleiri ráðgevar.

**Tekniska nevnd 8. mai 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at fíggingin verður játtað av íløgum í 2008.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og at flyta kr. 500.000,00 av íløgujáttanini til gøtu til Hvítanes.

**Býráðið 26. mai 2008:** Atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Anfinn Brekkstein.

| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>13. september 2012 | Blað nr.:<br>10034 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

Greiddu ikki atkvøðu: Inga Dahl, Bjarti Mohr og Jan Christiansen,

- Fyri at fáa fatur á lendinum til ætlaðu rundkoyring er neyðugt at fáa fíggingina tøka skjótast gjørligt. Í staðin fyri at halda á við projekteringini sambært ávístari játtan í býráðnum 26.05.08 (smb j. Nr. 2008-1294), verður í staðin fyri mett betur, at peningur verður játtaður til keyp av lendi. Samlaði kostnaðurin fyri at fáa útvegað lendi til rundkoyringina er uml. kr. 650.000,-.

**Tilmæli:**
Vísandi til at Føroya Løgting ikki hevur sett pening av til íløgur í innkomuvegin til Havnar, er projektið til dagføring av Sundsvegnum ikki so átroðkandi sum upprunaliga. Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at heita á býráðið, umvegis fíggjarnevndina, at játta restupphæddina av játtaðu kr. 500.000,- frá 26.05.2008, sum er áljóðandi 385.116,- pr. 1. februar 2009, til mál nr. 2005-2344 til keyp av lendi.

**Tekniska nevnd 16. februar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ætlanum at byggja tónlistarskúla á økinum eystan fyri Norðurlandahúsið, skal støða takast til um ikki Sundsvegurin skal dagførast til væntandi øktu ferðsluna, ið fer at verða við íbindingina til Sundsvegin. Samstundis skal støða eisini takast til um ikki fjarhitaleiðing skal leggjast frá Berjabrekku at knýta til tónlistarkúlan, mgl. svimjihøllina, Norðurlandahúsið og Gundadalsøkið.

Sum støðan er í dag, eru uml. 800 húski í Hoyvíkshaganum knýtt at fjahitafelagnum, sum fær ókeypis orku frá kommunalu brennistøðini. Umleið 40% av samlaða orkuframleiðsluni verður ikki gagnnýtt, og tískil skuldi verið rúm fyri at veitt orku til Norðurlandahúsið, komandi tónlistarskúla umframt alt Gundadalsøkið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til, at nevndin, umvegis fíggjarnevndina og býráðið, raðfestir avseting av kr. 400.000,- til at gera skitsuuppskot við útgreinan av kostnaði fyri dagføring av Sundsvegnum við atliti til at leggja nýggjar fjarhitaleiðingar til Norðurlandahúsið, komandi tónlistarskúla umframt alt Gundadalsøkið, á íløguætlanini fyri 2012.

**Tekniska nevnd 25. august 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

Sjúrður Olsen luttók ikki.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Settar eru 2 mió. kr. av til dagføring av Sundsvegnum fyri fíggjarárið 2012 (§6 konto 8175).

**Tilmæli:**
Vísandi til býráðssamtykt frá 8. sept. 2011 um at raðfesta kr. 400.000,- til at gera skitsuuppskot, mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini til at játta kr. 400.000,- av íløgum fyri 2012 (§6, kto. 8175) til projektering av skitsuuppskoti við kostnaðarmeting at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 1. desember 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at játta kr. 400.000 av íløgum fyri 2012 av konto 8175 til projektering av skitsuuppskoti og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 14. desember 2011:** Jákup Símun Simonsen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli. Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, saman við ráðgeva, latið gera uppskot til linjuføring av Sundsvegnum. Talan er um 2 ymisk uppskot á strekkinum millum vegamótið Gæsugøta/Sundsvegur og rundkoyringina við Norðara Ringveg.

Ráðgevin kemur á fundin at leggja fram og greiða frá fyrimunum og vansum viðvíkjandi uppskotunum.

**Tekniska nevnd 4. september 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við linjuføringini í framlagda uppskotinum frá Verkfrøðingastovuni, TK, Sundsvegur S, VFS 06.07.2012 og at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.
Nevndin samtykti eisini at beina málið í býráðið til kunningar.

**Býráðið 13. september 2012:** Kunnað varð um málið.

## FUNDUR LOKIN KL. 20:45

## GERÐABÓKIN GÓÐKEND:

| | | |
| --- | --- | --- |
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |
| Maria Hammer Olsen | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |